TIL SØLU
1 song 90x200 cm. v/botni lam. ljós fura kr. 200,- 1 song 90x200 cm. v/botni + náttborð kr. 400,- lam. eik.
Tlf. 447093/250093

GAMLIR MØBLAR KEYPAST
Eg vil fegin keypa gamlar møblar so sum kommodur, skamlar, stólar, dekkatoysskáp, tallerkenrekkjur o.a.Tað er líka mikið, hvør træsortin er ella um tað er avsýrað ella ikki. Ring 513858 ella skriva til:
fru_b@altfyrieitt.fo

TIL SØLU
Hornasofa 800,-
Tlf. 312219/583388

BÍLIGA TIL SØLU
4 reolir, 1 stovuborð bíliga til sølu, reolir eru samlisett frá Skemmuni og Idé Møblar.
Tlf. 265182

EITT LJÓST KØKSBORÐ
ca. 1 ár, sum nýtt, til sølu fyri 1.400 kr. Nýprísur 2.300,-
Tlf. 315555, eftir kl. 18

HYGG HER!
1 sett 2x3 sofa við hvítum betrekkið til sølu vegna plásstrot. Eisini fylgir eitt træ-sofaborð við um ynskist. Ring og gev eitt boð.
229933

Pløgg

HVÍTAR HOSUR
stødd 42-43 til før. mannfólkabúnan til sølu fyri 350,- kr. Bara brúktar einaferð.
Tlf. 225937

Sjavs

SJAVSKAPPING
Almenn sjavskapping verður í Posthúskjallaranum í miðbýnum í Tórsgøtu týsdagin 7. august kl. 19.

Súkklur

HARLEY DAVIDSON MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Ein 5 ára gomul Harley Davidson Sporster 883 til sølu. Súkklan er í besta standi og útgjørd við Screaming Eagle útstoyti og luftfilltri. Boð omanfyri 70.000,- kr. hava áhugað. Vinarliga ringið ella sms'ið til
212927

TIL SØLU
Ein Aprilia RX50 árg. 2004, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 264380/214722

DAMUSÚKKLA
DBS damusúkkla til sølu, 21 gear.
Tlf. 214448

Ymiskt

FERÐ TIL SKOTLANDS TIL SØLU
Ferð til Skotlands við nørrunu í aug. til sølu. 4 fólk við bili. Kostnaður 4000,-.
Vinarliga ringið 314633

SÓKNIST EFTIR HESUM SANGINUM
Eigur nakar henda sangin »Nu vil jeg fortælle min skæbne så tung. Min sorg den begyndte den tid, jeg var ung. Min moder hun døde et år jeg da var« o.s.v. Eg havi mist sangin vekk. Takk fyri.
Tlf. 265862/315540

SUMMARFESTIVALUR
3 atgongumerki til summarfestivalin til sølu
315548 / 586816

20 FÓT CONTAINARI
fæst við at avheinta hann.
Tlf. 586243

BROSJA TIL FØROYSKA BÚNAN
(oxiderað silvur, mynstur við grindareiðskapi) mist ólavsøkudag í miðbýnum í Havn, hevur nakar funnið hana, vinarliga sig mær frá.
Tlf. 361930/561931

TIL SØLU
Nýggjar hvítar træ persiennur til sølu fyri 100 kr. stk.
Tlf. 255279

STÓR SÍL
Á Nesvatni eru altíð nøkur stór ælabogasíl, 55-60 cm. Nærri fæst at vita á
Tlf. 447565 ella 260887

MOLD
Góð havamold ynskist, helst í Havn, men alt hevur áhuga.
Tlf. 223262/317396

TRAPPA TIL SØLU
Høgravend 1/4 sving, úr furu við gelendara og platti. 13 trin + plattur, 85 cm. br. Prísur: kr. 3.500,-
Tlf. 310956 ella 520410

YNSKIST
Gassfløska 6 kg ella størri.
522046

HEILSANIR

Góði elskaði Lucas
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 6. aug. Nú ert tú blivin so stórur. Vit elska teg yvir alt. Jesus pápi verið hjá tær. Muss og klemm.
Frá mammu og babba

Góða Lea
Tillukku við føðingardegnum.
Heilsan til mammu.
Esther og Martin

Halló hon sjálv
Ja nú er skjótt tíð at fara aftur í tjaldið. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 50 ára føðingardegnum. Gleða okkum til veitsluna.
Heilsan tann fimm armaði

Góði abbi
Hjartaliga tillukku við 69 ára degnum. Takk fyri eitt gott summar.
Heilsan Emma

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: **>>Heilsanir<<**